Fylgiskjal 14

LM-070/2020

Til Fíggjarmálaráðið

fmr@fmr.fo

AKT 31 Hoyringssvar frá Yrkisfelagnum Miðnám

Tórshavn, 10. februar 2020

Hoyringssvar til *Uppskot til ætlaðar broytingar í løgtingslóg um eftirløn(eftirlønarlógin)(Frítøka fyri uttanlandsinntøku, hækking av bundna inngjaldinum og javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar)*

Stýrið fyri Yrkisfelagið Miðnám hevur hesar viðmerkingar:

Ad.1

Lógin við tvungnu eftirlønaruppsparingini var gjørd fyri at tryggja, at øll í minsta lagi hava eina eftirlønaruppsparing upp á 12%. Tá mann nú politiskt frítekur ein bólk – her uttanlandsinntøkuna, má tað vera tí, at politiski myndugleikin hevur álit á, at hesin bólkur sjálvur klárar at tryggja aldurdómin. Um hetta kemur at hava minni umsiting við sær, er sera ivasamt, tí júst undantøka fyri nøkur krevur meiri umsiting enn eingin undantøka.

Harafturat skal viðmerkjast, at uttanlandsinntøkan ikki eigur at vera frítikin tvungna eftirlønaruppsparing, tí hetta er ein sosial inntøka til landskassan, sum øll eiga at gjalda sítt inn til uttan mun, hvar tú arbeiðir, so leingi tú býrt í Føroyum. Hesin arbeiðsbólkur er, og kemur at vera – eins og restin av arbeiðsbólkunum, ið starvast og búgva í Føroyum, ein brúkari av landsins tænastum og sostatt eisini ein útreiðsla fyri samfelagið. Tí eiga uttanlandsinntøkur ikki at vera frítiknar tvungnu eftirlønaruppsparingina.

Ad.2

Uppskotið um bundan eftirløn kom fyri at tryggja øllum eina rímiliga eftirløn, og flestu fakfeløg hava krav um eftirløn í teirra sáttmála, og fáa vit sjálv 15%, tí tykiskt tvungna eftirlønaruppsparingin til 15% í 2029 logisk.

Ad.3

Javnbjóðiskapping millum eftirlønarveitarar sær út til at gagna løntakaranum. Ynskiligt er tó at vita, hvør avger um váðin er hóskandi og gagnligur? Eru hetta peningastovnarnir sjálvir?

Annars hevur stýrið ikki fleiri viðmerkingar.

Vegna stýrið fyri Yrkisfelagið Miðnám,

Olgar Danielsen, formaður